# Viagra til jólini

Í Danmark merkja tey ein týðiligan vøkstur í søluni av sonevndu potenspillarum í november og desember mánaði. Orsøkin er helst, at mannfólkini vilja vera til reiðar til eyka frídagarnar saman við makanum, sum høgtíðin gevur.Bæði Pfizer, ið selja Viagra, og Eli Lilly, sum standa fyri søluni av Cialis boða soleiðis frá stórum vøkstri í sínari sølu.



# Syngjandi jødar vitja

Í døgunum 1. til 5. desember vitja jødisku hjúnini Lisa og David Loden í Føroyum. Tey fara at tala og syngja á møtum og tiltøkum um landið. David og Lisa Loden eru tvey av teimum kendu nøvnunum innan teir messiansku jødarnar í Ísrael. Tey eru ikki minst kend gjøgnum sang og tónleik. Tey hava gjørt bæði løg og tekstir til nógvar sangir, ið verða brúktir í messianskum meinigheitum, og tey hava eisini givið nakrar fløgur út og eru ofta úti og syngja – bæði í Ísrael og uttanlands. Fyrsta tiltakið við hjúnunum báðum verður leygardagin kl. 21 í missiónshúsinum Thabor í Fuglafirði, sunnudagin kl. 11 syngja tey við gudstænastuna í Christianskirkjuni og kl. 18 við møtið í Meinigheitshúsinum í Havn. Týsdagin verða tey í missiónshúsinum á Toftum, og mikudag endar vitjanin við einum møti í Emmaus í Klaksvík. Á øllum tiltøkunum koma tey at tala, syngja og greiða frá teirra arbeiði. Tulkað verður til føroyskt.

# tt stórt frambrot



- Fiskamarknaður Føroya er eitt gott dømi um úrslit, sum kunnu spyrjast burtur úr hjá framskygdum fakfeløgum, segði Óli Jacobsen við móttøkuna á Fiskamarknaði Føroya í gjár

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Kristian Fríðrik Olsen, stjóri í Landingarmiðstøð Føroya og Jens Kristian Olsen, stjóri í Faroe Fishmarket. Aftanfyri spælir Óli Johannesen hugnaligar harmonikutónar*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Harry Benjaminsen, formaður í Tofta Arbeiðarafelag, handaði Jógvani I. Olsen og Óla Jacobsen hvør sína mynd fyri trúgva tænastu*

Mynd: Vilmund Jacobsen

sum frá leið var blivin ein fíggjarlig vanlukka. Hon tryggjaði virkjunum, at tey kundu klára sínar skyldur uttan mun til, um høgur ella lágur prísur fekst fyri framleiðsluna og uttan mun til útreiðslur. Skip og manningar fingu bert avlopið, eftir at øll onnur høvdu fingið sítt sum prís umfram møguligan almennan studning.

- Hetta merkti, at parturin hjá virkjunum av marknaðarvirðinum á fiskinum bara vaks og samstundis minkaði parturin, ið varð goldin sum fiskaprísur.

Óli segði, at hann seinni gjørdi eina útrokning sum vísti, at árini 1978-1988 var marknaðarprísurin á upsa øktur við 2,49 krónum fyri kilo av ráfiski. Av hesum kom bert 1 oyra upp á prísin, sum virkini skuldu gjalda, meðan tær 2,48 krónurnar fóru til øll liðini á landi.

- Um hesa tíðina komu eisini fyrstu uppskotini um at avtaka alla prísáseting, men tíðin var ikki búgvin til tess, legði hann aftrat.

### FF slóðaði fyri

Á einum fiskivinnutingi á heysti 1986 legði Óli Jacobsen fram uppskot um eina nýggja skipan á hesum øki. Íblásturin til hetta uppskot var ein ferð hjá nevndini fyri ráfiskagrunnin millum annað í Danmark, har nevndin sá, hvussu høgir prísir kundu fáast við marknaðarbúskapi.

- Uppskotið hjá mær gekk út upp á, at virkini - heldur enn at fáa eitt fast krónutal fyri hvørt kilo av ráfiski at gjalda sínar útreiðslur við - skuldu fáa ein prosentpart av framleiðsluvirðinum. Á henda hátt fór tað at loysa seg hjá virkjunum at fáa "lagkøkuna" - marknaðarprísin - at verða so høgan sum gjørligt. Samstundis fór tað eisini at loysa seg hjá virkjunum at hava lægst møguligar útreiðslur á virkjunum. Ein slík skipan hevði merkt, at meira fekst burtur úr til allar partar.

Óli vísti á, at hetta uppskot var slóðbrótandi í síni tíð og varð væl móttikið, men av politiskum orsøkum, sum hann tók til, varð tað ikki samtykt fyrr enn í 1988.

- Hetta er ein longri søga, men tá skrivaði eg sjálvur uppskotið, sum varð lagt fram á ting, segði hann.

Av ymiskum orsøkum varð henda nýggja skipanin ikki sett í verk fyrr enn um ársskiftið 1989/1990. Ein orsøk til seinkanina var marknaðarkreppa, og ein onnur orsøk var, at trupult var at fáa partar av flakavinnuni at sleppa teirri gomlu koddaskipan.

Hann segði, at tað tó eisini vóru flakavirkismenn sum stuðlaðu hesum fult og heilt frá byrjan av.

- Tá ið glið kom á, var skjótt, at prískapping byrjaði um fiskin.

Óli helt fyri, at henda prískapping saktans kann kallast eitt fíggjarligt undur, har virkini skjótt kundu gjalda munandi hægri prís uttan studning, enn tey fyrr høvdu goldið við studningi.

### Vinnan syndabukkur

- Veruliga søgan um hetta mál kemur ongantíð í almennu søgukrivingina. Hóast tað kann sigast at hava verið vinnan, sum gekk á odda fyri at fáa broytt hesa skipan, so gjørdist hon kortini syndabukkur fyri, at tað gekk sum tað gekk. Í staðin fingu politikararnir heiðurin fyri hesa gongd, hóast teir júst í 1999 samtyktu í prinsippinum at innføra gomlu prísásetingina - og koddaskipanina – aftur, segði Óli.

Við móttøkuna á Toftum í gjár vísti hann á, at næsta stigið at stuðla hesi kapping var uppboðssølan, fyrst tann almenna og síðan Fiskamarknaður Føroya.

- Føroya Fiskimannafelag var ikki við heilt frá byrjan av, men vit komu skjótt við.

Hann legði dent á, at tað eru fakfeløgini, Tofta Arbeiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, sum í veruleikanum eiga meirilutan í tí, sum nú er Landingarmiðstøð Føroya.

- Hetta er eitt gott dømi um úrslit, sum kunnu koma burtur úr hjá framskygdum fakfeløgum, legði Óli aftrat.

### Umskipan av FMF

Óli vísti á, at hann sum formaður í nevndini kom at hava ein fittan leiklut í samband við umskipanina av Fiskamarknaði Føroya í 2005.

- Hetta er eitt avrik, sum vit allir kunnu vera stoltir av, tí her vóru nógvar forðingar. Men eftir at hesar vórðu fingnar av vegnum, eydnaðist at fáa eina skipan, sum allir partar kundu taka undir við. Hetta skapti samstundis frið um uppboðssøluna.

Hann segði, at úrslitið gjørdist ein skipan, sum var í javnvág – ein skipan, sum tryggjar øllum pørtum í vinnuni á sjógvi og landi javnbjóðis umboðan og harvið ávirkan.

- Hetta merkti eisini, at Føroya Fiskimannafelag átti ein sjálvskrivaðan nevndarsess í uppboðssøluni umframt nevndarsessin í landingarmiðstøðini. Hetta var eitt gott dømi um, hvussu eitt fakfelag við førleika kann fáa ávirkan á eitt arbeiðsøki, har tað hevur náttúrlig áhugamál.

Óli segði, at síðan hann er vorðin uttanfyri FF, hevur felagið niðurlagt ein stóran part av sínum virkisøkjum, eisini týdningarmikla økið við fiskaprísum.

- Hetta hevur FF nú gjørt við sjálvboðið at sleppa tí týdningarmesta nevndarsessinum hjá felagnum, nevniliga umboðanini í uppboðssøluni. Hetta er eisini eitt beinleiðis brot á javnvágina millum partarnar á hesum øki, sum var eitt avgerandi grundarlag fyri skipanini. Hetta merkir, at í dag eru arbeiðarar, reiðarar, útróðrarmenn og flakavirki umboðað í nevndini. Einasti bólkur, sum ikki er umboðaður, eru fiskimenn, sum hava sett seg sjálvar uttan fyri.

Óli helt, at hetta er eitt syrgiligt dømi um, hvussu skjótt tað er at bróta niður tað, sum hevur tikið mong ár at byggja upp.

- Hinvegin kann tó eisini sigast, at "varðin" er so mikið væl lagaður, at hann fer ongan veg, hóast ein steinur verður tikin úr honum, segði Óli Jacobsen við móttøkuna á Toftum í gjár.